tíðindablaðið sosialurin

Útgevari: P/f Sosialurin ©
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Blaðfólk: Høgni Djurhuus
Randi Jacobsen
Tórfinn Smith
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Telefon 1 18 20
Argjavegur 26, 3800 Argir
Postsmoga 76, 3800 Tórshavn

Endurreisn

oddagrein

HØVUÐSSETNINGURIN hjá hesi samgonguni var at endurreisa. Partvíst búskapin. Partvíst sosialu støðuna. Og partvíst støðuna at vera líka fyri lógum og reglum. At hetta er eydnast í stóran mun hava vit fingið at vitað frá landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum og seinast í nýggjársrøðu løgmans.

UTTANLANDSSKULDIN var tað stóra spøkilsið hjá sambandshøvdinginum alla tíðina, hann sat í andstøðu, men so skjótt hann slapp framat í 1980, tók uttanlandsskuldin av álvara dikt á seg. Hon trífaldaðist eftir einum landsstýrisskeiði við bestu innløguárum. Nú er eydnast hesi samgonguni at steðgað vakstrarferðini hjá uttanlandsskuldini og hon er hálva aðru milliard minni enn búskaparfrøðingar roknaðu við fyri fýra árum síðani.

HANDILSJAVNAHALLIÐ var millum 600 og 700 milliónir krónur í fjør. Tað er nógv, og er einar 300 milliónir meira enn mett á ólavsøku. Orsøkin er m.a. munandi afturgongd í fiskiskapi. Og á hin bógvin vigar tann nógvi innflutningurin tungt. Men gjaldsjavnahallið — sum eisini fevnir um peningaflutning, ferðing o.a. — røkkur ikki 300 milliónum og tað er tað minsta síðani 1982.

LANDSKASSIN hevur eisini styrkt støðu sína hetta valskeiðið við millum 600 og 900 milliónum krónum, so myndin er ikki so døpur, sum Dagblaðið málaði hana í gjár. Landsstýrinum er eydnast at fylla allar teir grunnar, sum vóru komnir í afturhond undir sambandsfólkafloksstýrinum. Og peningur er enntá tøkur til skilabótalán til fiskiskipaflotan.

DAGBLAÐIÐ hevur partvíst rætt, tá tað sigur, at tað er ikki eydnast at minka privata brúkið. Men tað er eydnast at tálma brúkið nakað við búskapartiltøkum. Men eina og aleina at geva tiltøkunum skyldina fyri krøvum fakfelaganna um hægri løn er fullkomiliga burturvið. Allir vanligir lønarbeiðarar og almenn starvsfólk sóu, hvussu nógv fólk í privatu- og tænastuvinnuni yvirhálaðu aðrar bólkar í lønarvøkstri og komu upp á eitt støði, sum onki samsvar hevur við føroyskt lønarlag og føroyska framleiðslu. Man henda gongdin ikki vera ein av høvuðsatvoldunum til lønarkrøvini, umframt ta stóru reallønarminking, sum var undir seinasta landsstýri?

LANDSSTÝRINUM er eydnast at skorða samfelagið búskaparliga uttan at fíggjarlógin er trífaldað sum undir seinasta landsstýri. Og harafturat er eydnast at fremja munandi sosialar ábøtur og fremja nýggj tiltøk á arbeiðsmarknaðarøkinum til frama fyri vanliga lønarbeiðaran.

m-

tjak og meiningar

Avsannar

Undirritaða, Kittan Jacobsen, fyrrverandi ljósmóðir í Klaksvík, skal hervið boða frá, at eg einki kenni til tað, sum vikublaðið Hjemmet leggur meg undir at hava sagt í samrøðu við 2 blaðkvinnur um mítt starv sum ljósmóðir undir læknastríðnum, tá hetta evnið undir viðtaluni als ikki varð umrøtt, og skal eg sostatt siga frá, at tað sum stendur í Hjemmet nr. 53 dagfest 28/12-1987 á síðu 111, sum annars vísir til næsta blað, er mær ókunnugt og berur heilaspuni — er óndsinnað skriving, sum sjálvandi einki hald er í.

Eg kann bera øllum, eg eri komin saman við í sambandi við mítt arbeið alt tað besta, og vil hervið nýta høvið til at takka øllum tykkum mongu fyri tað stóra hjálpsemi bæði á ein og annan hátt, mær altíð hevur verið sýnt.

Vinarliga heilsan og gott nýggjár.

Klaksvík, hin 30/12-87

Kittan Jacobsen
Torvgøta, Klaksvík

Image...

Honda Accord er mere end en bil. Nærmere en livsstil. Accord 2,0 EXi. 122 hk. 0-100 km/t 9,0 sek. Tophastighed 193 km/t. Blokeringsfri bremser fås som ekstraudstyr. 3 års lak- og 6 års anti-rust garanti.
Kig ind og få en prøvetur.
Fås fra kr. 165.000,- (Accord 1,6 LX)
Accord leveres også som 3-dørs med 2,0i motor.

NORDBIL
v. Martin Dam Jacobsen
Bilverkstaður - Dekksøla
Oyggjarvegur - tlf. 13707

HONDA - fremskridt med visioner...

Eftirútbúgving

Føroya Byggifrøðingafelag skipar í døgunum 3. - 6. febr. 1988 fyri skeiði á Hotel Vágum.

Skeiðevnini eru hesi:

1. Felags beskrivilsisprincipp
2. 5 ára ábyrgd
3. Kvalitetssikring
4. Systematisk viðlíkahald

Skeiðið vendir sær til virkir, eftirlitsfólk og annars øll áhugað.

Luttakaragjaldið er **kr. 4.500,-**, íroknað er skeiðtilfar, matur og innivist.

Fráboðan um luttøku kann fara fram á tlf. 15996.

Seinasti fráboðanardagur er 20.01.88.

FØROYA BYGGIFRØÐINGAFELAG
FUGLOYARVEGUR 8 · POSTSMOGA 1349 · 3800 TÓRSHAVN · FØROYAR
FBF